## Óli um »Vespureiðrið«

Mær dámar betri sendingina í ár. Sendingin er nógv batnað í mun til ífjør. So leingi innihaldið í sendingini er umhugsað, er sendingin gagnlig, og tá er hon styrkjandi fyri samleikan hjá NSÍ.



## … um Jens Martin Knudsen

Jens Martin er óivað tann seriøsasti ítróttarmaðurin, eg havi íðkað ítrótt saman við. Hann er fyrimyndarligur, og ein sannur undangongumaður. Jens Martin er eisini ótrúliga jaligur og skemtingarsamur av lyndi.

# Tað gav úrslit at taka

## Óli Hansen hevur verið ímyndin av stabilitetinum hjá NSÍ. Sjálvur hevur hann eitt bakland, sum gevur honum fullan uppbakkning til at halda fram við fótbóltsspælinum á hægsta støði



### Ítróttarprofilurin



**Heri Simonsen**
blaðmaður
heris@sosialurin.fo

Liverpool hevur slagorðið “You´ll never walk alone” og Manchester United nevnir heimavøllin: “Theatre of dreams”. NSÍ hevur uppbygt sær eitt slagorð í 2007: “Vit taka ein dyst í senn”. Nøkur hava havt hug at flenna eftir hesum nógv endurtikna setningi hjá Óla Hansen, liðskipara hjá NSÍ. Men tann, sum flennur síðst, flennur best. Stabili verjukletturin er ikki bara liðskipari hjá NSÍ. Óli Hansen er eisini pressutalsmaðurin hjá liðnum. Hetta er í samráði við venjaran, og allan Formulahópin hjá NSÍ. Fjølmiðlafólk hava givið ilt av sær, at ikki onkur annar NSÍ-leikari er sloppin at úttala seg. Men stigatalvan rættvísger hesa, og aðrar disposisjónir hjá NSÍ. Úttalilsini hjá hinum FM-biðlunum hava verið litríkari og fjølbroyttari, men ikki bóru tey á fremsta mál.

### Ótrúlig kensla

Tað er kortini ikki frítt, at Óli Hansen er eitt sindur rørdur av tí, sum hann hevur upplivað síðstu vikurnar. “Vit vóru so umgyrdir av glaðum viðhaldsfólki norðuri í Klaksvík, at tað var ikki meir enn, at eg náddi at hevja FM-steypið. Inni í Støkk-høllini fekk eg so nógv klemm frá fólki, sum høvdu tár í eygunum, at eg fekk næstan ikki førkað meg.” fortelur Óli við eitt sindur av stoltleika. Tað er ein ótrúlig kensla fyri hann, og hinar NSÍ-leikarnar. FM-heitið hevur ein ófatuligan týdning fyri tey flestu í Runavíkar Kommunu. Men Óli ásannar, at rómurin, sum var í Klaksvík síðsta leikdagin, busstúrurin gjøgnum Søldarfjørð, Glyvrar, Saltangará og Runavík, og ótrúliga móttøkan í ítróttarhøllini í Runavík, verður neyvan endurtikið í líka stórum málistokki aftur. Tað verður stórt at endurvinna FM-heitið, men einki er sum at vinna FM-heitið fyrstu ferð! Tað hevur stungið djúpt hjá NSÍ-viðhaldsfólkunum, at B68, GÍ og ÍF hava vunnið FM. Men nú er kompleksið, um ikki at hava vunnið FM, jarðað niður í jørðina!

### Bar til frá fyrsta dysti

Ásannanin hjá Óla og hinum í NSÍ, at tað kundi eydnast í ár, kom longu eftir fyrsta dystin. Teir skoraðu til 1-0 í 94. minutti á Sandi, ímóti B71, hóast illa sperdir í 2. hálvleiki. Tann dysturin setti standardin fyri aðrar dystir, har tað hevur riðið um snarið hjá NSÍ. Eisini tá NSÍ tapti ímóti EB/S og HB, dyst um dyst. Tað var aftaná henda stutta niðurtúrin, at slagorðið: “Vit taka ein dyst í senn” vann frama í hópinum.

### Byrjaði 5 ára gamal

Óli var 5 ára gamal tá hann byrjaði at leika fótbólt við NSÍ í 1982. Familjan hjá honum hevur ikki havt nógv tilknýti til fótbóltsumhvørvið. Men foreldrini hava stuðlað honum væl, líka frá tí degnum hann fann vegin út til Løkin, sum 5 ára gamal. Hann íðkaði fimleik við Støkk frá 7 til 12 ára aldur, men eftir hetta hevur bara fótbólturin verið á breddanum. Óli vann FM við smádreingjunum hjá NSÍ í 1989, og FM við unglingunum í 1995 og 96. Tá Óli var í Skúla í Kolding – árini 1998-2000 - leikti hann við Danmarksseriuliðnum hjá Kolding. Heimafturkomin fekk Óli sáttmáli við GÍ. Óli leikti tvey ár við GÍ. Hann var við til at vinna Løgmanssteypið í 2000. Òli skeyt sigursmálið í finaluni ímóti HB. Martin Juul Jarnskor lovaði honum eina gás tá. Men tann gásin má verða væl gødd nú, tí hon er ikki komin á borðið enn. Óli var á trettandi ári tá landsliðið gjørdi um seg í Landskrona. Tá birtist dreymurin um at sleppa á landsliðið, og at sleppa út um landoddarnar at leika fótbólt. Men tá Óli var tannáringur slapp hann ikki heilt framat landsliðsborðinum. Hann fekk ein U-18 landsdyst ímóti Íslandi. Í 2004 var hann við til at tapa 0-5 ímóti Póllandi í sínum fyrsta A-landsdysti. Hann hevur eisini verið við á venjingarlegum í Spania. Hann var m.a. við tá landsliðið fekk ein 2-2 javnleik ímóti HamKam úr bestu norsku deildini. Hann fortelur flennandi: “Abbi segði mær, at hann hevði